Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Steig Nielsen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Verjusemja

Spurningar:

1. Ynskir Føroya landsstýri at vera við í verjusemjuni, sum danska stjórnin leggur upp til? – og um ja, hvørji ynski hevur landsstýrið til verjusemjuna?
2. Vil landsstýrið vera við til at styrkja um trygdina í Norðuratlantshavinum – og um ja, hvussu?
3. Ætlar landsstýrið at varðveita leistin um, at donsk málsøki sum t.d. verjan skulu gjaldast av danska statskassanum, ella skal landskassin gjalda fyri verjusemjuna ?
4. Hevur landsstýrið fingið innbjóðing til innleiðandi fundirnar um verjusemju? Um ja, hvør í landsstýrinum hevur luttikið til hesar fundir?

Viðmerkingar:
Í strembanini hjá donsku stjórnini at røkka NATO kravinum um, at tvey prosent av BTÚ skulu nýtast til fígging av verju, eru samráðingar innleiddar um nýggja verjusemju. Í hesum sambandi hevur virkandi danski verjumálaráðharrin, Troels Lund Poulsen, meldað út, at Arktis og Norðuratlantshavið hava fremstu raðfesting. Undanfarni landsstýrismaður í uttanríkismálum luttók á uppstartsfundinum til verjusemjuna fyri einum ári síðani. Umframt hetta hevur virkandi danski verjumálaráðharrin, Troels Lund Poulsen, verið í Føroyum á vitjan og verið á fundi við landsstýrismannin í uttanríkismálum, Høgna Hoydal, har boðað varð frá, at hann ynskti at hava føroysku og grønlendsku landsstýrini við, tá verjusemjan skal gerast. Framløgan av Arktiska kapacitetspakkanum varð nógv átalað, tí landsstýrið og Løgtingsins Uttanlandsnevnd ikki vóru kunnað um átøkini, sum vóru avtalað við pakkanum. Fyri at tryggja, at sama støða ikki endurtekur seg, er skrivað í danska stjórnarlagið, at landsstýrini verða kunnað og inndrigin til samráðingar, ið ávirka Føroyar.
Landstýrið og danska stjórnin nýta orðingina: ”Einki um okkum uttan okkum” og ”intet om Færøerne og Grønland skal besluttes uden om Færøerne og Grønland. ”. Hetta má skiljast sum, at landsstýrið tryggjar sær, at ongar avgerðir um Føroyar verða tiknar, uttan at landsstýrið er við í avgerðunum.
Grundarlagið fyri spurningunum til Aksel V. Johannesen, løgmann, er út frá omanfyri nevnda og við tí endamáli at fáa upplýst, hvør landsstýrisins leistur er til verjusemjuna.

Á Løgtingi, 30. mai 2023

Bárður á Steig Nielsen